# Teir gløddu við

**Spaniólarnir, sum skulu byggja nýggju suðuroyarferjuna, hava júst verið á vitjan í Føroyum. Eftir at hava sæð sjónband av Smyrli í illveðri, skilja teir nógv betri, hví Strandferðslan setir so høg krøv til skipið**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Her eru spaniólarnir á veg umborð á Smyril á veg til Suðuroyar. Ytst vinstrumegin er stjórin á Strandferðsluni, Reidar Nónfjall, ytst høgrumegin er tekniski stjórin á strandferðsluni, Magnus Magnussen. Undir liðini á honum stendur danski skipameklarin og nummar fýra frá høgru er tað skiparin á Smyrli, Hanus Lassen. Hinir fýra eru spaniólar*

Umboð fyri Skipasmiðjuna, sum skal byggja nýggju suðuroyarferjuna, hava nú verið í Førooyum og hugt eftir umstøðunum her.

Tað var ein vælmannað sendinevnd úr Spania við fimm fólkum frá IZAR skipa-smiðjusamtakinum, ið skal byggja nýggju suðuroyarferjuna, sum vóru í Føroyum í fýra dagar í farnu viku.

Talan vóru um forsetan í skipasmiðjusamtakinum, sum var í Føroyum og við sær hevði hann tekniska stjóran á Skipasmiðjuni í San Fernando, ið skal byggja nýggju suðuroyarferjuna, umframt projektleiðaran, sum stendur fyri arbeiðnum at byggja nýggju suðuroyarferjuna og eitt fólk afturat. Við í ferðini var eisini eitt umboð fyri danska skipameklaran »Maersk Brokers«

### Skilja støðuna betri

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at vitjanin var sera væl eydnað.

– Vit hava alla tíðina lagt dent á at fáa umboð fyri skipasmiðjuna til Føroyar at hyggja síggja viðurskiftini her, tí vit halda, at tað hevði gagnað sjálvari byggiætlanini at teir sóu umstøðurnar, har nýggja skipið skal sigla.

Á ferðini vóru tey í Suðuroy og vitjaðu við Smyrli og hugt var annars eftir umstøðunum á havnunum o.s.fr.

– Á ferðini við Smyrli var fínasta veður so vit máttu fortelja teimum, at nýggja skipið kom mangan at sigla undir harðari treytum enn hesum, sigur Reidar Nónfjall.

Hann sigur, at teir vístu eisini sponsku gestunum sjónband av Smyrli í Suðuroyarfirði ein illveðursdag, har alt var undir í sjóroki og hann ordiliga setti í stórari aldu.

– Tað gerst ikki burtur, at spaniólarnir gløddu við, tá ið teir sóu sjónbandið, tí hetta eru teir hóast alt ikki vanir við.

Reidar Nónfjall sigur, at eftir Føroya vitjanina vita spaniólarnir nógv meiri um, hvat teir hava við at gera og, hvørjum umstøðum skipið, teir skulu smíða, hevur at sigla undir og sjálvir hildu teir eisini, at teir høvdu fingið stóra nyttu burturúr ferðini.

– Tað skerst ikki burtur, at nú skilja teir nógv betri, hjví vit seta so hørð krøv til dygdina í skipinum og nú er tað lættari hjá okkum at grundgeva mótvegis teimum, enn tað var frammanundan.

Reidar Nónfjall leggur afturat, at tað beinleiðis sambandið ímillum fólk í støðum sum hesari, er heldur ikki at undirmeta, tí tað ger tað nógv lættari at samskifta framyvir, heldur enn um alt samskiftið skuldi verið ígjøgnum t-post og fax.

– At so spaniólarnir eisini vóru púra ovfarnir av náttúruni í Føroyum, gjørdi tað ikki verri og tann eini av teimum var enntá so hugtikin, at hann fór ikki heimaftur við ferðalagnum, men varð verandi eftir í Føroyum, her hann fekk sær nakrar feriudagar afturat, sigur Reidar Nónfjall.

# Gera ábøtur fyri fimm milliónir á Tvøroyri

**Millum annað skal peningurin skal brúkast til harðliga tiltrongdar ábøtur á Nýggjavegi og á ítróttarhøllina og skúlan í Trongisvági**

ÁBØTUR
*Áki Bertholdsen*



*Nýggivegur á Tvøroyri er ein høvuðsvegur, men hann hevur verið illa farin. Nú skal hann asfalterast av nýggjum og gongubreytin í ovara borði, sum ongantíð er gjørd, men er grasgrógvin og hevur gjørt mestu nyttu sum beiti hjá seyði, verður eisini gjørd nú*

**Tvøroyri:** Fólk á Tvøroyri hava leingi verið nívd av vánaligu fíggjarstøðuini hjá kommununi og nógv viðurskifti í kommununi hava ikki verið søkt so væl sum ynskiligt hevur verið, eitt nú vegirnir.

Men nú er farið at ganga framá aftur – og tað koma borgararnir eisini at merkja.

Ikki minst er rentan lækkað so nógv, at útreiðslurnar tann vegin vera einar tvær milliónir lægri í ár enn upprunaliga mett. Samstundis vísir roknskapurin fyri í fjør eisini, at raksturin hjá kommununi gekk betri enn væntað, tí partvís vóru inntøkurnar hægri enn mett og partvís vóru útreiðslurnar lægri enn mett. Tað førdi við sær, at ístaðin fyri at hava eitt undirskot upp á 700.000 krónur á seinastu fíggjarlóg, varð talan um eitt yvirstkot upp á 2,3 milliónir.

Og kommununan hevur staðiliga brúk á meiri pengum til ymsar ábøtur og íløgur.

### Neyðugar ábøtur

Tí samtykti Tvøroyrar Býráð á fundi mánakvøldið at játta góðar fimm milliónir eyka til ymsar ábøtur í kommununi.

Tvær milliónir av teimum verða fingnar til vega við at rentuútreiðslurnar minka í ár og restin verður tikið av gjaldførinum hjá kommununi.

Peningurin skal brúkast til ymsar ábøtur, sum eru harðliga tiltrongdar.

Eitt nú skal alt takið á Ítróttarhøllini og skúlanum í Trongisvági skiftast. Hetta er eitt arbeiði sum kostar 2,2 milliónir, men í ár verður ein millión brúkt til tað endamálið. 600.000 eru goldnar, so 600.000 eru eftir til næsta ár.

Harafturat er ætlanin at asfaltera Nýggjaveg, tað er høvuðsvegurin omanfyri sjálva bygdina, sum er bundin í landsvegin inni í Trongisvági.

Somuleiðis er ætlanin at gera gongubreytina í ovara borði á Nýggjavegi liðugt.

Hetta er eitt arbeiðið sum er mett at kosta tvær milliónir og ætlanin er at gera tað í ár.

Harafturat er ætlanin at brúka smáar 1,2 millión niðri á havnalagnum, tað skal brúkast til at asfaltera nýggja økið niðri á havnalagnum eystanfyri flakavirkið hjá Fiskavirking, umframt til at projektera nýggja bryggju fyri á økinum, sum er fylt út. Møguliga verður eisini eitt sindur fylt út afturat.

Umframt hetta, eru 300.000 krónur settar av til kloakkir, so at tann játtanin kemur upp á góðar 800.000 krónur í ár.



# Samgonguflokkar grundleggjandi ósamdir um privatisering

**Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin draga hvør sína línu í málinum um privatisering av Fiskavirking. Tjóðveldisflokkurin sigur seg nú helst vilja hava ætlanir um privatisering lagdar á ís, soleiðis at fyritøkan sleppur at koyra víðari sum ogn hjá Framtaksgrunninum. Fólkaflokkurin vil hava privatisering framda sum skjótast.**

PRIVATISERING
*Rúnar Reistrup*

Hóast samgonguflokkarnir í vikuni kundu semjast um eitt svar til nevndina í Framtaksgrunninum, sum fyri trimum vikum síðan spurdi seg fyri um politiska hugburðin hjá samgonguni í sambandi við privatiseringsætlanirnar hjá grunninum, so eru samgonguflokkarnir alt annað enn samdir um hvussu og nær ein privatisering av Fiskavirking og Fiskasøluni eigur at fara fram.

Heini O. Heinesen, løgtingsumboð Tjóðveldisfloksins og næstformaður í vinnunevndini, sigur, at Tjóðveldisflokkurin sær helst, at Fiskavirking sleppur at halda fram sum fyritøka undir Framtaksgrunninum. Við øðrum orðum eiga allar ætlanir um at privatisera Fiskavirking, sambært politisku sjónarmiðum Tjóðveldisfloksins, at leggjast á ís.

- Tað hevur tikið Fiskavirking tíggju ár at byggja eina góða og burðardygga fyritøku upp, so hví ikki lata hana fáa frið at vísa hvør dugur er í henni, spyr Heini O. Heinesen, sum ikki sær nakran trupulleika í, at ein partur av føroyska vinnulívinum er á almennum hondum.

- Aðrastaðni í heiminum hevur tað roynst væl at hava almennar og hálvalmennar fyritøkur í vinnulívinum, so hví skuldi tað ikki gjørt ta her, spyr Heini O. Heinesen.

### Viðtøkurnar siga privatisering

Men størsti samgongufelagi Tjóðveldisfloksins, Fólkaflokkurin, hevur eina heilt aðra hugsan. Bæði løgmaður og vinnumálaráðharrin hava fleiri ferðir givið til kennar, at eftir teirra tykki eigur ein privatisering av Fiskavirking at fara fram skjótast gjørligt.

Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, segði í grein í blaðnum í gjár, at útskiftingin av nevndini í Framtaksgrunninum í vár varð grundað á, at gamla nevndin ikki vildi virka eftir viðtøkunum fyri grunnin, sum sambært tulkingingini hjá vinnumálaráðharranum ongan iva lata vera um, at fyritøkur, sum Framtaksgrunnurin eigur, skulu seljast, tá tær eru rakstrardyggar.

Bjarni Djurholm segði seg ikki hava annað val enn at seta onnur fólk í nevndina fyri Framtaksgrunnin, sum vildu virka eftir viðtøkunum. Um ikki hann gjørdi hetta, máttu viðtøkurnar broytast, segði vinnumálaráðharrin í blaðnum í gjár.

### Ósemja um mannagongd

Orsøkin til at næstformaðurin í Vinnunevndini, Heini O. Heinesen nú dregur eitt sindur í land aftur, eftir at hava verið við til at fest eina orðing í samgonguskjalið um at farast skal undir at privatisera vinnuligu fyritøkurnar hjá landinum, tá ein partabrævamarknaður er settur á stovn, er at samgonguflokkarnir eru so ósamdir um hvussu ein privatisering skal fara fram.

- Tað sær út til, at fyri fólkafloksmenn snýr privatisering av Fiskavirking seg fyrst og fremst um at fáa fatur á gullinum. Men at drepa eina hønu, sum verpir gullegg, er ikki nøkur góð loysn. Nú tað sær út til at Fólkaflokkurin hevur hug at fáa Fiskavirking selt í smáum bitum er vandi fyri, at tað, sum higartil hevur riggað væl, fer at detta niðurfyri. Tí halda vit, at privatisering av Fiskavirking eigur at bíða, nú samgonguflokkarnir eru so ósamdir um, hvussu ein privatisering eigur at fara fram, sigur Heini O. Heinesen, sum ikki vil siga, hvussu leingi privatiseringin av Fiskavirking eigur at leggjast á ís, men ikki heldur tað vera nakað mál í sær sjálvum at privatisera innan hetta valskeiðið er farið.

- Tað er ikki sjónarmiðið hjá Tjóðveldisflokkinum, at tað privata altíð riggar betur enn tað almenna. Hví ikki lata Fiskavirking fáa arbeiðsfrið, nú tað er farið at ganga væl hjá fyritøkuni, spyr Heini O. Heinsen, næstformaður í Vinnunevndini.

Tað er nevndin í Framtaksgrunnurin sjálv, sum avger nær og til hvønn hon selur ognirnar hjá grunninum. Men nevndin í Framtaksgrunninum hevur biðið vinnumálarðaharran um politisk signalir, sum hon eftir øllum at døma vil brúka sum part av grundarlagnum fyri virksemi sínum.

# Framtaksgrunnurin fær veikt signal

**Tað er ivasamt hvussu nógv nevndin í Framtaksgrunninum fekk burturúr at biða Vinnumálaráðið um politisk signalir viðvíkjandi ætlaðu privatiseringini av Fiskavirking og Fiskasøluni**

POLITIKKUR
*Rúnar Reistrup*

Nevndin í Framtaksgrunninum eftirlýsti í brævi til Vinnumálaráðið dagfest 12. juni í ár politiskum signalum viðvíkjandi ætlaðu privatiseringini av Fiskavirking og Fiskasøluni.

Týsdagin í hesi vikuni sendi Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, nevndini so eitt svar, eftir at málið hevði verið fyri á landsstýrisfundi. Eftirspurdu signalini vóru tó so veik, at tað er ivasamt hvat nevndin í Framtaksgrunninum kann brúka tey til.

Svarið, sum nevndin í Framtaksgrunninum fekk uppá sínar ítøkiligu spurningar, var stutt og greitt: "Landsstýrismaðurin ynskir ikki at taka støðu og úttala seg um ítøkiligar ætlanir, sum Framtaksgrunnurin hevur, eru í samsvari við ella í mótstríð við politiska hugburðin í landsstýrinum/samgong uni, tí nevndin eigur at taka avgerðirnar samsvarandi viðtøkunum, og eigur herundir sjálv at taka støðu til um og hvørji vinnupolitisk atlit eiga at takast."

Men meira ógreið eru signalini í viðmerkingunum, sum landsstýrið samdist um at senda við svarinum. Í viðmerkingunum verður millum annað sagt, at "politiska leiðslan ikki eigur at blanda seg upp í virksemið hjá Framtaksgrunninum", men lagt verður afturat, at "einskiljing av almennum fyritøkum verða ikki framdar, fyrr enn virðisbrævamarknaður er farin at virka."

# Úr Listaskálanum í Platform

**Hevur ein tíð og hug ber til at skipa sær ein lagan túr í býnum eftir Jazzfestivalinum í kvøld. Túrurin kann byrja í Listaskálanum, fara framvið Gamla Meiarínum og enda í Platform. Øll støðini eru karmar um Jazzfestivalin í kvøld.**

JAZZFESTIVALUR
*Rúnar Reistrup*

Jazzfestivalurin er nú í gongd á sínum fjórða og næstsíðsta degi. Í kvøld vara tiltøkini heilt út á náttina, tá finski bólkurin Wentus Blues Band fer at spæla á Platform til tann ljósa morgun.

Fyrr í kvøld, klokkan 19.30 verður møguleiki at hoyra bólkin hjá Branduri Jacobsen, Minor Bran Dur, við amerikansku songkvinnuna Deborah Herbert í Listaskálanum.

Klokkan 21.30 vera tveir bólkar at hoyra á Gamla Meiarínum. Fyrri bólkurin á palli verður Malan Thomsen Kvartet, sum umfarmt songkvinnuna Maluna Thomsen, er mannað av Stamen Stanchev, Brandi Øssursson, Agnari Lamhauge og Høgna Klakkstein.

Hin bólkurin, sum spælir á Gamla Meiarínum í kvøld, ber navnið Lossingarmenn, sum teir fýra Búi Egason Dam, Leivur Thomsen, Hallur Johannesen og Rógvi á Rógvu hava valt at kalla sín nýggja bólk.

Jazzfestivalurin endar leygarkvøldið.



*Malan Thomsen spælir á Gamla Meiarínum í kvøld*